## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri, seinnapartin minni vindur av landnyrðingi. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur, partvís kavi. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 5 stig.

**Mikukvøldið fara fýra tónleikarar við stórari uppseting av slagverki og tveimum flyglum at hava konsert í Norðurlandahúsinum.**




# Tónlistarligt brak í Norðurlandahúsinum

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Í annaðkvøld klokkan 19.30 verður forkunnug konsert í Norðurlandahúsinum við bólkinum »In Evidenza«.

Teir tríggir tónleikararnir, sum manna hesa trio, eru tveir slagverksleikarar, Matias Seibæk úr Danmark og Andrés Ramos úr Frankaríki, og ein klaverleikari, Manuel Esperilla úr Spania.

Hesir tríggir tónleikararnir hittust á danska tónleikaháskúlanum í Keypmannahavn, og í 2008 stovnaðu teir In Evidenza. Trio'in leggur serligan dent á at spæla nútímatónleik og nýskrivað verk fyri klaver og slagverk. Eitt av høvuðsendamálunum er at samstarva við ung tónaskøld og harvið verða við til at lita framtíðartónleikin fyri júst hesa samanseting av ljóðførum.

Til konsertina í Norðurlandahúsinum hava teir heitt á dugnaligar føroyskar kreftir. Føroyski klaverleikarin Jóhannes Andreasen fer at spæla saman við teimum til eitt verk, ið er bílagt frá tónaskaldinum Tróndur Bogason. Verkið hevur heitið »Butterfly« og verður framført á fyrsta sinni til hesa konsertina.

Eitt annað bílagt verk verður eisini á skránni, og er hetta skrivað av unga danska tónaskaldinum Jeppe Just Christensen. Harumframt fer In Evidenza at framføra verk eftir nøkur av mætastu tónaskøldunum í 20. øld, m.a. Iannis Xenakis, Anton Webern, og Philippe Hurel.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -1 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | 5 |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 18 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 10 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 973 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.

**Komandi nátt:**
Djúpa lágtrýstið í útsynning úr Føroyum kemur spakuliga hendavegin og grynnist. Brúgvalagið yvir Føroyum fer í ein útnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/11 kl. 06[00] – 18/11 06[00]. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 17/11 kl. 06[00] – 18/11 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 61 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

22. november Mánin longst frá jørðini
24. november Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24.nov | - | 12:08 | 11:08 | 23:40 | 11:23 | 23:55 | 01:36 | 14:08 | 02:36 | 15:08 | 10:22 | 22:55 | 09:22 | 21:55 | - | 12:23 | 00:51 | 13:23 | 11:53 | - | 00:36 | 13:08 |
| 25.nov | 00:40 | 13:11 | - | 12:11 | - | 12:26 | 02:40 | 15:11 | 03:40 | 16:11 | 11:26 | 23:58 | 10:26 | 22:58 | 00:55 | 13:26 | 01:55 | 14:26 | 00:25 | 12:56 | 01:40 | 14:11 |
| 26.nov | 01:43 | 14:01 | 00:43 | 13:01 | 00:58 | 13:16 | 03:43 | 16:01 | 04:43 | 17:01 | - | 12:16 | 11:16 | 23:34 | 01:58 | 14:16 | 02:58 | 15:16 | 01:28 | 13:46 | 02:43 | 15:01 |
| 27.nov | 02:19 | 14:38 | 01:19 | 13:38 | 01:34 | 13:53 | 04:19 | 16:38 | 05:19 | 17:38 | 00:34 | 12:53 | 11:53 | - | 02:34 | 14:53 | 03:34 | 15:53 | 02:04 | 14:23 | 03:19 | 15:38 |
| 28.nov | 02:57 | 15:17 | 01:57 | 14:17 | 02:12 | 14:32 | 04:57 | 17:17 | 05:57 | 18:17 | 01:12 | 13:32 | 00:12 | 12:32 | 03:12 | 15:32 | 04:12 | 16:32 | 02:42 | 15:02 | 03:57 | 16:17 |